## Stjørnukast í Tórsgøtu

Borgarstjórin, býarverkfrøðingurin og tekniska deild hjá Tórshavnar kommunu hava í dag loyvt Kringvarpinum at senda nýggjárskonsertina Stjørnukast beinleiðis úr Reinsarínum í Tórsgøtu í miðbýnum í Havn týsdagin 30. desember. Í hesum sambandi verður Tórsgøta, frá Mariu Poulsen til og við Miðlahúsinum, stongd frá klokkan 17 og fram til á midnátt hetta kvøldið. Tilnevningar, fimm í hvørjum bólki, eru gjørdar, so kringvarpslurtarar kunnu velja ársins ítróttanavn og ársins tónleikanavn. Atkvøtt verður um heimasíðuna hjá Kringvarpinum www.kringvarp.fo.




## X-Mass í Reinsarínum

Leygarkvøldið 20. Desember verður eitt sokallað X-Mass Heavy Metal Special tiltak í Reinsarínum í Tórsgøtu í Havn, har bólkarnir Synarchy og Sic luttaka. Tiltakið byrjar klokkan 22 og heldur á fram til klokkan 02.

# Maria Moy avhøvdað

**Ótangar finna sær frægd í at gera herverk á jólabýin hjá Tórshavnar kommunu, og eitt kvøldið varð høvdið brotið av Mariu Moy í dukkuframsýningini**



*Menn frá kommununi mugu taka upp eftir ótangunum hvønn morgun*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

HERVERK
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Tórshavnar kommuna hevur gjørt nógv burtur úr jólunum við nógvu ljósketunum og serstakliga við hugnaliga jólabýnum í Sparikassagarðinum. Trupulleikin er bara, at jólabýurin fær ikki frið.

- Tað byrjaði fyri tveimum vikuskiftum síðani, men nú er tað blivið til hvørt kvøld, at ungdómar gera seg inn á jólabýin, sigur Rókur Tummasarson frá Snarskivuni.

Hann sigur, at lásini verða brotin, og so sita ungdómar eftir øllum at døma inni í húsunum og hugna sær og roykja. Eisini verða ljósperur brotnar, og hetta hendir sjálvt um Ansni hevur eygað við jólabýnum.

- Tað er næstan so, at tað er frægari í vikuskiftunum, tí tá er so nógv fólk í býnum. Og tá hava vit eisini vaktir gangandi at ansa eftir jólabýnum, tá dansurin endar, sigur Rókur Tummasarson.

Hann heldur, at tað er ógvuliga harmiligt at herverk skal verða gjørt á jólabýin, tí kommunan hevur nýtt nógvar pengar upp á hann.

- Vit hava fingið nýggj hús, sum eru gjørd í samstarvi við Tekniska skúla. Tað hevur kostað kommununi 200.000 krónur, og tá er tað harmiligt, at noyðast at brúka nógvar pengar til umvælingar og vaktir, sigur Rókur Tummasarson.

### Brotið dukkur

Rókur metir, at tað eru ungdómar, sum einki annað hava at taka sær fyri, sum gera seg inn á jólabýin.

- Gerandiskvøld er einki fólk vanliga í býnum, og tá er lættari hjá teimum ungu at krógva seg. Viðhvørt sær tað út, sum hava tey roynt at seta eld á, men tað kann kanska hava verið rakettir ella annað nýttársfýs, sum kann hava verið brent av, sigur Rókur Tummasarson.

Eisini hava ótangarnir gjørt seg inn lutir í jólabýnum, og tað eina kvøldið hevði onkur brotið høvdið av Mariu Moy.

- Vit hava nú eisini verið í samband við løgregluna og heitt á hana um at hava eyguni við jólabýnum, tá teir koyra runt um næturnar kortini, sigur Rókur Tummasarson.

Men enn er so neyðugt hvønn morgun at sópa glassplintur saman og seta nýggjar perur í ljósketurnar, eins og nýggj lás mugu setast á húsini. Og tað harmast tey, sum hava við jólabýin at gera, um.

# Eingin farvegur eftir Honnu

**Hóast stórt manntal hevur leitað eftir Honnu Christophersen í tríggjar dagar, er hon sum sokkin í jørðina**

LEITING
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

So hvørt sum tíðin gongur minkar vónin um at finna 78 ára gomlu Hannu Christophersen aftur á lívi.

Løgreglan hevur leitað við hundi til seint í gjárkvøldið, og leitingin varð tikin upp aftur tíðliga í morgun. Leitað hevur verið frá Svartafossi oman í Hoydalar við hundi, men eingin farvegur er at finna eftir gomlu konuni.

Av løgreglustøðini verður sagt, at enn verður leitað intenst, men sum tíðin líðir fer intensiteturin helst at minka. Leitingin verður spakuliga víðkað, men tað eru kortini ikki nakrar ætlanir í løtuni at leita aðrastaðni í landinum.

Seinnapartin fer bjargingarfelagið at leita framvið landi við bátinum Lív, og leitað verður eisini í Vestmanna og Kvívík.

Tað var mánakvøldið, at Hanna bleiv burtur, og nú, tríggjar dagar seinni, er framvegis einki lívstekin fingið frá 78 ára gomlu konuni.



*Leitað verður við hundi eftir 78 ára gomlu Hannu Christophersen*